# Føroyingar í Íslandi

## Fólkatal, aldursbýti og ættarlið

Sambært hagtølum, ið Sendistova Føroya hevur fingið til vega frá Hagstofu Íslands, búgva íalt 799 føroyingar, býtt yvir 2 ættarlið, í Íslandi.

Tað var ikki møguligt at fáa upplýsingar um 3. ættarliðið, tí íslendska hagstovan hevði ikki neyðuga tilfarið.

Í samstarvi við Hagstofu Íslands eru 1. og 2. ættarlið skilmarkað soleiðis:

1. Ættarlið
Fólk sum eru fødd í Føroyum, men sum í dag eru búsitandi í Íslandi, og hava annaðhvørt føroyskan ella íslendskan ríkisborgararætt.

2. Ættarlið
Fólk sum eru fødd í Íslandi, men sum hava foreldur, har antin annað ella bæði eru fødd í Føroyum. Hesi hava annaðhvørt føroyskan ella íslendskan ríkisborgararætt.

**Talva 1: Føroyingar í Íslandi (01.01.2008)**

| Ættarlið | Mannfólk | Konufólk | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| 1. | 207 | 268 | 475 |
| 2. | 186 | 138 | 324 |
| Øll | 393 | 406 | 799 |

Í fyrsta ættarliðnum er býtið millum kynini nakað javnt, tó er ein lítil meiriluti av konufólki. Av 475 fólkum eru 268 konufólk, hetta er 56%.
Í øðrum ættarliðnum er ein lítil meiriluti av mannfólki. Av 324 fólkum eru 186 mannfólk, og er hetta 57%.

Teir 799 føroyingarnir sum búgva í Íslandi, svara til 1,6% av samlaða fólkatalinum í Føroyum, sum 1. feb. 2009 var 48.797 (Hagstova Føroya). Føroysku útisetarnir eru 0,25% av samlaða íslendska fólkinum, sum 1. jan. 2008 var 315.459. Hóast hetta er sera lítið, er hetta lutfalsliga ikki nógv minnið enn føroyingarnir í Danmark sum í 2006 vóru 0,42% av samlaða danska fólkatalinum (Hagtøl um Føroyskar Útisetar).

Tá ið Sendistovan fór í holt við hesa kanningina var endamálið m.a. at samanbera við kanningina, um Føroyskar útisetar í Danmark, sum Norðuratlantsbólkurin stóð fyri.
Í fyrstu atløgu var tó ikki møguligt at fáa upplýsingar frá Hagstofu Íslands um t.d. útbúgvingarstøði og arbeiðsmarknaðarviðurskifti hjá føroyingum í Íslandi, og er henda kanningin tískil ikki so umfatandi sum kanningin um Føroyskar útisetar í Danmark.




Mynd 1 vísir,  at í fyrsta ættarliðnum er aldursbólkurin 60 ár og eldri størstur, meðan aldursbólkurin 25-39 ár er næststørsti bólkurin.




Mynd 2 vísir at í øðrum ættarliðnum er aldursbólkurin 25-39 ár størstur, meðan aldursbólkurin 7-16 ár er næststørsti bólkurin.




Í mynd 3, sum vísir bæði ættarliðini, er aldursbólkurin 25-39 ár størsti bólkurin. Eftir hann koma aldursbólkarnir 7-16 ár og 60 ár og eldri.




Mynd 4 vísir bæði ættarlið skift á øki. Allir føroyingar í Íslandi eru tó ikki við á hesi myndini, men bert 647 av 799, tá ið tað bert var møguligt at fáa bústaðar upplýsingar um teir frá Hagstofu Íslands.
Myndin vísir, at nógv flestu føroyingar í Íslandi eru búsettir í høvuðsstaðarøkinum.